# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Neistagentur vunnu í Svøríki

Gentur 14-lið hjá Neistanum hevur hesar dagarnar verið við í Partille cup í Svøríki og tað við sera góðum úrsliti. Við sigri í finaluni gjørdust Neista-genturnar fyrsta føroyska lið, sum vinnur hesa kappingina, sum er í Svøríki á hvørjum sumri. Í finaluni spældi Neistin ímóti danska liðnum, Hjortshöj Egå IF, og tað var ein serstakliga tættur, javnur og spennandi dystur, sum endaði við, at Neistin vann ein tepran 11-10 sigur, eftir 5-5 í hálvleikinum. Gjøgnum dystin skiftust liðini um at verða á odda, og sagt verður, at gott verjuspæl og góðir málverjar vóru orsøkin til ein so málfátækan dyst. Serliga endin í dystinum bleiv ómetaliga spennandi, tí tá 30 sekund vóru eftir, fekk danska liðið brostkast og javnaði til 10-10. Samstundis fekk Neistin eina útvísing, men tá ið 12 sekund vóru eftir, fekk Neistin brotskast, sum varð sett í málið, so at Neistin vann 11-10. Sostatt eru tað nú lið úr tilsamans 23 londum, sum hava vunnið hesa kappingina.

*aki@sosialurin.fo*

# Meistarar á rossabaki

**KAPPRÍÐING** Um vikuskiftið endaði kappingin fyri tey, sum hava riðið á íslandsrossi, og nú eru funnir føroyameistararnir í teimum ymsu greinunum

Áki Bertholdsen

Í kappingunum verður dømt eftir, hvussu rein taktin hjá rossinum er, hvussu kropsburðurin hjá rossinum er, hvussu samanspælið millum ross og reiðfólk er og annað. Talan er um altjóða reglur og tað merkir, at eliturossini í Føroyum eru eisini eliturossini í útheiminum.

Í barnaflokkinum, sum eru børn upp til 14 ár, er føroyameistarin Beinta M. Helmsdal á Garpur. Kappingin í fjórgongd er fyri ung upp til 18 ár. Har er støðið nakað hægri enn í barnaflokkinum og har eitur føroyameistarin Daniella Joensen á Pokkabót.

Opni flokkurin er fyri vaksin, ið vilja kappast á einum lægri stigi og her bleiv Føroyameistarin Anna Maria Joensen á Vón. Í fjórgongd fyri vaksin eitur føroyameistarin Heri D. Dahl á Straumur og í fimmgongd bleiv føroyameistarin Kristfríð Dam Jacobsen á Mangas. Í tølt eitur føroyameistarin Knút Lützen á Drotning.

Heri D. Dahl var somuleiðis valdur til ársins ríðara. Hann vann seks pláss í innleiðandi kappingini við trimum hestum, og hetta er ikki hent fyrr. Í finaluni fekk hann heili 7,1 stig, sum er tað mesta, nakar hevur fingið í fjórgongd í Føroyum. Hann vann eisini Samreiðsteypið, sum verður givið fyri besta samarbeiði millum hest og reiðfólk.

# Fjallasúkkling í Vágum



VINNARIN

*Gunnar Dahl-Olsen vann fjallasúkklukappingina í Vágum leygardagin*

Mynd: Høgni Øster

Hilmar Jan Hansen

Leygardagin var fjallasúkklukapping í Vágum, sum var á einum teini úr Vatnsoyrum norður til Fjallavatn. Teinurin varð súkklaður tríggjar ferðir aftur og fram hjá teimum vaksnu og tvær ferðir aftur og fram hjá unglingunum, so samlaði teinurin var ávikavist 24 og 16 kilometrar.

Hjá monnum vann Gunnar Dahl-Olsen við tíðini ein tími, 9,38 minuttir, og smáar tveir minuttir eftir hann kom Torkil Veyhe á mál, ein minutt framman fyri Andras Joensen, ið aftur var hálvanfjórða minutt framman fyri Sigmund Olsson. Kári Olsen, ið var fimtur á mál, vann kappingina hjá »Old Boys«.

Teir báðir unglingarnir, ið vóru við, fylgdust sera væl, og endaspurturin millum teirra gjørdist sera spennandi. Tóri Nielsen kom á mál við tíðini ein tími og 11,15 minuttir, og bara eitt sekund seinni kom Jóanis Albert Nielsen á mál.

Hetta var triðju ferð, at kappast varð í H&G MTB Cup 2010, og kappingin leygardagin var tann, ið upprunaliga skuldi vera 1. mai, men tá bleiv útsett.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Europa aftur best

**HM2010** Aðru HM-kappingina á rað fóru europeisk lond avstað við bæði gulli, silvuri og bronsu

Hilmar Jan Hansen

Nú HM-kappingin í Suðurafrika er farin aftur um bak, kann enn eina ferð staðfestast, at hetta var ein góð kapping hjá frægastu europeisku londunum. Hóast stór fótbóltslond sum Italia, Frakland og Portugal ikki rukku allan vegin, bjargaðu Spania, Holland og Týskland europeisku æruni, tí hesi trý endaðu millum fýra tey bestu.

Hvørki Spania ella Holland, sum komu í finaluna, høvdu áður vunnið heimsmeistaraheitið og hetta var fyrsta HM-finalan hjá Spania, meðan Holland fyri triðju ferð endaði millum tvey tey bestu. Spania gjørdist heimsmeistari og vann gull, Holland silvur og Týskland bronsu, tá liðið í fyrrakvøldið vann á Uruguay í bronsufinaluni.

Hóast Europa var væl umboðað ímóti endanum, so stóð uppaftur betur til, tá HM-endaspælið fyri fýra árum síðani var í Týsklandi. Ta ferðina vann Italia á Fraklandi í finaluni, sum bæði mátti út í umdyst og brotsspørk, og Týskland vann á heimavølli bronsu eftir dyst ímóti Portugal. Men hetta er aðru ferð á rað, at Europa vinnur bæði gull, silvur og bronsu – og fyrstu ferð, at eitt land úr Europa vinnur HM í einum øðrum heimsparti.

Uruguay gjørdist fremsta umboðið fyri Suðuramerika, tí hvørki Brasil ella Argentina bóru boð í bý, tá tað ráddi um at koma langt í kappingini. At Uruguay stóð seg so væl, er merkisvert, tí landið hevur ikki meira enn tríggjar milliónir íbúgvar – og so hevur Uruguay enntá í bæði 1930 og 1950 vunnið HM.

Einki av suðuramerikansku londunum tapti nakran dyst ímóti londum úr øðrum heimspørtum, fyrr enn komið var til allarsíðsta umfar í bólkaspælinum. Í finaluumførunum var tað kortini øvugt, tí tá taptu europeisk lond ikki ein einasta dyst ímóti londum úr nøkrum av hinum heimspørtunum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*